Hoyringsvar til uppskot um broyting í løgtingslóg um løggilding av elinleggjarafyritøkum.

Í § 1. stendur at endamálið við lógini er at tryggja at elektriskar innleggingar verða rætt gjørdar og serviseraðar við atlitið til trygd.

Er tað soleiðis at hettar hevur verið ein trupuleikið, og at hesin í høvuðsheitinum skyldast teimum smáu føeoysku aktørunum, sum eitt nú maskinmeistarum sum hava avmarkaða løggilding?

Tykist kanska hinvegin at talan er um at javntstilla lógina við donsku lóguna og harvið EU lóggávu.

Maskinmeistarafelagið er av tí áskoðan at fyriliggjandi uppskot fer at viðføra at siðvenjan við at eitt nú maskinmeistarar sum sigla úti, og hava hettar fyritaksemi tá ið teir eru heima, fara at missa hendan møguleikan.

Í verðandi lóg hava hesir møguleikan at fáa avmarkaða løggilding, har hann kann útføra arbeiði sjálvur, men tó ikki hava onnur fólk í starvi. Men eitt nú ásetingin um 30 tímars arbeiðsviku í fakinum gerð seg inn á hendan møguleikan og við hesum uppskotinum fer hettar í søguna. Sostatt kunnu vit sum yrkisfelag staðfest at viðri á okkara fjøldtáttaða útbúgvingi fellur í viðri.

Eisini kann ásetingin um 30 tímars arbeiðsviku í fakinum, gerða tað trupult hjá nýggjum veitarum at fáa løggilding, tí tað tekur tí at byggja ein kunfdakres upp. Eisini kann tað, um ella tá tíðirnar broytast og arbeiðin minka, fara at verða trupult hjá smáum veitarum at varveita løggildingina.

Eg haldi at verðandi skipan í stórna mun eg góð nokk, og sera gagnlig fyri okkara fakbólk.

Um man heldur at tað er neyðugt við uppstramming, hjá einmansfyritøkum sum hava avmarkaða løggilding fyri at varveita hana, so kann hettar gerðast við eitt nú uppfylgingarskeiðum og hartilhoyrandi góðskumetingum.

Fyri at taka samanum so tykist hettar uppskotið at fara at gagna stórum fyritøkum herheima og møguliga útlenskum fyritøkum sum fáa møguleikan at vinna seg inn á føroyska arbeiðsmarknaðin, men hinvegin so fer tað at forkoma teimum smáu einmansfyritøkunum við avmarkaða løggilding.

Vinarliga

Ólavur Gunnarsson formaður í Maskinmeistarafelagnum